**Býráðsfundur mánadagin 26. mars 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Steintór Jacobsen, Jan Erlingsson Petersen, Páll Isholm, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo og Tollakur Joensen

Páll Isholm møtti á fundi kl. 20.00 og var ikki við í viðgerðini av máli 1 og 2

**Ikki á fundi:** Terji Lervig

**Fundurin lokin kl. 22.30**

| | **Fundarskrá:** | **Fundarsamtykt:** |
|---|---|---|
| **1.** | **12/00066**<br>**Jónva Gregersen og Atli Feilberg í Syðrugøtu søkja um marknarbýti**<br>Í sambandi við at Jónva og Atli skulu byggja garð, hava tey sent umsókn til Eysturkommunu um at gera marknaðarbýti millum matr. nr. 99 og matr. m.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at fremja marknaðarbýti og at broyta linjuføringina við atliti til gongubreyt og ferðsluna. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd. |
| **2.** | **12/00098**<br>**Innkoyring til Effo í Leirvík, matr. nr. 8c**<br>Selmar Nielsen hevur gjørt eitt uppskot til nýggja innkoyring til Effostøðina í Leirvík og søkir um loyvi at gera innkoyringina.<br><br>Tekniska nevnd mælir til at EFFO fær loyvi at gera nýggja til og frákoyring, treyta av at Landsverk og grannin Bovling heimilar hesum. | Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd. |
| **3.** | **10/00560**<br>**Neyst hjá Landsverk:**<br>Á fundi í bygginevndini fyri báthylin bleiv kunnað um tekningar ið eru komnar frá Landsverki í samband við staðseting av neystunum. Selmar Nielsen ynskir at neystini verða staðsett nakað annarleiðis og at Landsverk ger sítt prosjekt liðugt.<br><br>Bygginevndin er samd um at lata Landsverk plasera teirra neyst í miðjuni og at tekniska nevnd kann viðgera málið um byggiloyvi til Landsverk. Eysturkommuna byggir neyst og skúrar norðanfyri neystini hjá Landsverk fyri ikki at blíva seinkað av neystunum hjá Landsverk. | Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá meirlutanum í teknisku nevnd<br><br>**Atkvøður fyri:**<br>Jóhan Christiansen<br>Jan E. Petersen<br>Tollakur Joensen<br>Hanna Jensen<br>Fríðgerð Heinesen<br>Hans Mourits Foldbo<br>Páll Isholm<br><br>**Atkvøddi blankt:**<br>Steintór Jacobsen |

**Býráðsfundur mánadagin 26. mars 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Steintór Jacobsen, Jan Erlingsson Petersen, Páll Isholm, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo og Tollakur Joensen

Páll Isholm møtti á fundi kl. 20.00 og var ikki við í viðgerðini av máli 1 og 2

**Ikki á fundi:** Terji Lervig

**Fundurin lokin kl. 22.30**

Meirlutin í teknisku nevnd, Jan E. Petersen og Tollakur Joensen mæla til at fylgja staðsetingini sum SNA og bygginevdnin vísa til. Minnilutin, Steintór Jacobsen mælir til at neystini verða vend, at neystini venda oman og niðan.

**4. 12/00123**

**Reglugerð fyri nýtslu av bátaplássum í Eysturkommunu**

Støðutakan til fyriliggjandi uppskot til reglugerð.

Einmælt samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskoti.

**5. 12/00062**

**Umbøn um viðmæli til tiltaksloyvi, konsertloyvi og skonkiloyvi til G! Festival 2012**

Trivnaðarnevndin mælir til at viðmæla tiltaksloyvi, konsertloyvi til G! Festivalin 2012.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini.

**6. 12/00056**

**Bygnaðarbroytingar á dagstovnaøkinum**

Umsitingin hevur gjørt tilmæli til møguligar broytingar á dagstovanøkinum,

Trivnaðarnevndin mælir til at taka undir við uppskoti 2 í tilmælinum frá umsitingini, men um ovara hædd verður tøk, kann verða farið yvir til uppskot 1.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini, og at aðrir hølismøguleikar verða eftirkannaðir.

Tollakur Joensen skjýtir upp at taka undir við uppskoti 1 hjá fyrisitingini.

Fyrst varð atkvøtt um tilmælinum hjá Tollaki Joensen og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Tollakur Joensen

**Atkvøður ímoti:**
Jóhan Christiansen
Jan E. Petersen
Hanna Jensen
Hans Mourits Foldbo
Páll Isholm

**Atkvøddi blankt:**
Fríðgerð Heinesen

Síðani bleiv atkvøtt um tilmæli hjá fíggjarnevndini og atkvødd bleivv soleiðis:

**Býráðsfundur mánadagin 26. mars 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Steintór Jacobsen, Jan Erlingsson Petersen, Páll Isholm, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo og Tollakur Joensen

Páll Isholm møtti á fundi kl. 20.00 og var ikki við í viðgerðini av máli 1 og 2

**Ikki á fundi:** Terji Lervig

**Fundurin lokin kl. 22.30**

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen
Jan E. Petersen
Tollakur Joensen
Hanna Jensen
Fríðgerð Heinesen
Hans Mourits Foldbo
Páll Isholm

**Atkvøddi blankt:**
Tollakur Joensen

Sostatt er tilmæli hjá fíggjarnevndini samtykt

**7. 12/00097**
**Umsókn frá KFUM – skótunum um fíggjarligan stuðul í samband við at skótarnir fylla 50 ár í 2012 (***Stovningardagurin var 5. mai 1962)*
Trivnaðarnevndin mælir til at stuðla við kr. 50.000 kr. og at peningurin verður veittur sum eykajáttan.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**8. 12/00100**
**Summarfrítíðin á dagstovnaøkinum 2012**
Meirlutin í trivnaðarnevndini, Hanna Jensen og Fríðgerð Heinesen, mæla til at umsitingin ger eina ætlan fyri ansing í summarfrítíðini og lýsa møguligan eykakostnað. Hesin eykakostnaður eigur at verða tikin við í fíggjarætlanararbeiði 2013. Minnilutin Páll Isholm mælir til, at stovnarnir hava stongt í ídnaðarfrítíðini.

Meirlutin í fíggjarnevndini, Jóhan Christiansen og Fríðgerð Heinesen mæla til at taka undir við tilmælinum hjá meirlutanum í trivnaðarnevndini. Minnilutin, Hans Mourits Foldbo mælir til at taka undir við tilmælinum hjá minnilutanum í

Fyrst bleiv atkvøtt um tilmæli hjá meilutanum í trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini og atkvøtt bleiv soleiðis:

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen
Jan E. Petersen
Fríðgerð Heinesen
Hanna Jensen

**Atkvøður ímóti:**
Hans Mourits Foldbo
Páll Isholm
Steintór Jacobsen

**Býráðsfundur mánadagin 26. mars 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Steintór Jacobsen, Jan Erlingsson Petersen, Páll Isholm, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo og Tollakur Joensen

Páll Isholm møtti á fundi kl. 20.00 og var ikki við í viðgerðini av máli 1 og 2

**Ikki á fundi:** Terji Lervig

**Fundurin lokin kl. 22.30**

trivnaðarnevndini.

**Atkvøddi blankt:**
Tollakur Joensen

**9. 12/00106**

**Ognartøka av 53a í Norðragøtu**

Hans Trygvi Teirrin, adv. hevur í langa tíð arbeitt við at fáa fatur í øllum eigurum á omanfyri nevnda matrikul, men tað er ikki møguligt at fáa fatur í øllum persónum.

Tekniska nevnd mælir til at fremja ognartøku av matr. nr. 53a í Norðragøtu, ið er partur av lendinum undir standmyndini Gøtu Tróndur.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevnd.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**10. 12/00057**

**Umsókn um skattafrælsi**

Taks biður um tilmæli frá býðráðnum til umsókn frá Iktus, kristiligt sjónvarp, um skattafrælsi.

Fíggjarnevndin viðmælir umsóknina um skattafrælsi.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**11. 12/00121**

**Gjald til ansing við útsetan av skúlabyrjan.**

Fyrispurningur er komin, um kommunan rindar fyri ansing um so er, at skúlabyrjanin verður útsett eitt ár, t.v.s at barni verður í barnagarði eitt ár afturat.

Fíggjarnevndin mælir til at kommunan ikki rindar foreldragjald tað árið.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**12. 12/00039**

**Keyp av bygningi hjá Sjóborg í Leirvík**

Á býráðsfundi tann 27. februar 2012 bleiv samtykt at keypa bygningin. Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi skeyti.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur mánadagin 26. mars 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Steintór Jacobsen, Jan Erlingsson Petersen, Páll Isholm, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo og Tollakur Joensen

Páll Isholm møtti á fundi kl. 20.00 og var ikki við í viðgerðini av máli 1 og 2

**Ikki á fundi:** Terji Lervig

**Fundurin lokin kl. 22.30**

**13.** **12/00030**
**Starvsfólkaskipan í Eysturkommunu**
Sambært kommunustýrislógini grein 5 stk. 4 skal kommunan hava eina starvsfólkaskipan.

Kommunustjórin hevur saman við leiðsluni gjørt uppskot til starvsfólkaskipan.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við fyrliggjandi uppskoti til starvsfólkaskipan.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**14.** **12/00076**
**Lutaíbúðir á matr. nr. 147bi í Leirvík**
Støðutakan til leiklutin hjá kommununi í verkætlanini.

Fíggjarnevndin mælir til at:

“Eysturkommuna er, saman við Húsalánsgrunninum sum fíggjara, stigtakari til byggiverkætlan av 5 lutaíbúðum í Leirvík og til stovnan av einum lutaíbúðarfelag í hesum sambandi. Eysturkommuna verður byggiharri til byggingin er liðug, tá ið lutaíbúðirnar verða handaðar til lutaíbúðarfelagið fyri keypsprís.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**15.** **12/00074**
**2.viðgerð av eykajáttan til keyp av bygninginum hjá Sjóborg í Leirvík**
1.viðgerð var á býráðsfundi tann 27. februar 2012, og var tá einmælt samtykt at veita eykajáttan á 1,5 mió. kr.

Peningurin verður tikin av innistandandi.

Einmælt samtykt at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð.

**Býráðsfundur mánadagin 26. mars 2012 kl. 19.30.**

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Steintór Jacobsen, Jan Erlingsson Petersen, Páll Isholm, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo og Tollakur Joensen

Páll Isholm møtti á fundi kl. 20.00 og var ikki við í viðgerðini av máli 1 og 2

**Ikki á fundi:** Terji Lervig

**Fundurin lokin kl. 22.30**

**16. 12/00111**

**1. viðgerð av eykajáttanum mars 2012**

Frágreiðing og tilmæli frá umsitingini fyriliggja. Umsitingin mælir til at eykajáttanir verða veittar á íalt 7,4 mió. kr., 4 mió. kr. eru til útbyggingina av skúlunum í Leirvík og Gøtu og 3,4 mió. kr. til felagshúsið í Sarpugerði.

Tekniska nevnd hevur viðgjørt málið viðv. eykajáttan til skúlan og meirlutin, Steintór Jacobsen og Jan E. Petersen, mæla til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini, minnilutin Tollakur Joensen atkvøður blankt.

Fíggjarnevndin mælir til at taka undir viðtilmælinum hjá umsitingini.

Í sambandi við mál nr. **12/00097 (umsókn um stuðul frá KFUM-skótunum)**, mælir fíggjarnevndin eisini til at veita eykajáttan á kr. 50.000,00, og at hesin peningur verður tikin av innistandandi.

Samtykt at veita eykajáttan á 4 mió. kr. til skúlanar.

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen
Jan E. Petersen
Fríðgerð Heinesen
Hanna Jensen
Hans Mourits Foldbo
Páll Isholm
Steintór Jacobsen

**Atkvøddi blankt:**
Tollakur Joensen

Samtykt at veita eykajáttan á kr. 3,4 mió kr til felagshúsið í Sarpugerði

**Atkvøður fyri:**
Jóhan Christiansen
Jan E. Petersen
Fríðgerð Heinesen
Hanna Jensen
Hans Mourits Foldbo
Páll Isholm
Tollakur Joensen

**Atkvøddi blankt:**
Steintór Jacobsen

Einmælt samytkt at veita eykajáttan á kr. 50.000,00 kr. til skótanar.

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

## Býráðsfundur mánadagin 26. mars 2012 kl. 19.30.

**Á fundi:** Jóhan Christiansen, Hanna Jensen, Steintór Jacobsen, Jan Erlingsson Petersen, Páll Isholm, Fríðgerð Heinesen, Hans Mourits Foldbo og Tollakur Joensen

Páll Isholm møtti á fundi kl. 20.00 og var ikki við í viðgerðini av máli 1 og 2

**Ikki á fundi:** Terji Lervig

## Fundurin lokin kl. 22.30

**Eysturkommunu býráð:**

Jóhan Christiansen ______________________________

Fríðgerð Heinesen ______________________________

Hanna Jensen ______________________________

Tollakur Joensen ______________________________

Jan Erlingsson Petersen ______________________________

Steintór Jacobsen ______________________________

Hans Mourits Foldbo ______________________________

Páll Isholm ______________________________